

# 10.000 umsóknir til 700 størv

**Jan Müller**

13.06.2014 - 11:00

Oljan.fo

Fyrr í ár søkti norska pallfelagið Songa Offshore eftir 700 medarbeiðarum í sambandi við, at felagið fær fýra pallar inn í norskt øki. Tað vísti seg, at áhugin var ovurhonds stórur. Teir fyrstu fjúrtan dagarnar komu 4.000 umsókinir, og tá freistin fór, høvdu 10.000 fólk søkt tey 700 størvini.

-Hetta er heilt ótrúligt, og eg var púra ovfarin av tí stóra áhuganum. Hetta vísir, at norska oljuøkið er framvegis eitt áhugavert arbeiðsláss, og at nógv ung vilja sleppa í frálandavinnuna, sigur stjórin í Songa Offshore, Bjørnar Iversen, við Sysla.no.

Hann sigur, at ein stórur partur av umsøknunum eru frá fólki, sum hava førleikarnar til tey leysu størvini, og at summi hava longu fingið arbeiði.

Hóast fleiri tosa um sparingar og minni virksemi á norskum øki frameftir, hevur stjórin í Songa Offshore góðar vónir.

-Vit hava góðar vónir um oljuvirksemið í Noregi. Her er politiskur tryggleiki, lógarverkið er gott, og viðskiftafeløgini eru sterk. Vit í Songa Offshore vilja vera við til at útbyggja norska landgrunnin, sigur Bjørnar Iversen. Men tað eru eisini avbjóðingar, sigur hann.

-Rakstrarútreiðslurnar eru sum kunugt ov stórar. Eg havi eina fatan av, at vit hava havt tað ov gott ov leingi. Tað er dýrt at arbeiða á norska økinum, og tí mugu vit vera dugnalig. Vit mugu fáa meiri av skafti, sigur Songa-stjórin.

Songa Offshore hevur høvuðsskrivstovu á Kýpros, men felagið ætlar mú at spenna seg út í Noregi.